## Holst tamdi oddaliðið




Christian Lamhauge Holst, sum hevur spælt ein landsdyst fyri Føroyar, skoraði aftur í næstbestu donsku deildini í gjár. Hetta var fyrsta málið hjá Holst, síðani kappingin byrjaði aftur í mars. Lyngby spældi ímóti oddaliðnum Randers, og Randers legði seg fram um 1-0 tíðliga í dystinum. Beint fyri hálvleik eydnaðist tað Christian Lamhauge Holst at javna fyri Lyngby, og 1-1 gjørdist úrslitið av dystinum.

## Todi ímóti Brann í kvøld

Start spælir sín triðja dyst í norsku tippuliguni í kvøld. Dysturin er á heimavølli ímóti Brann úr Bergen. Heimasíðan hjá Start skrivar, at Todi Jónsson hevur tað betur við hælsinuni, og at føroyski álopsspælarin er førur fyri at spæla ein part av dystinum ímóti Brann í kvøld.

### Jónhard út við skaða

Talan var um eina kraftiga stempling á ristina, sum sendi Jónhard Frederiksberg av vøllinum, tá tíggju minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki inni á Skála.

– Eg veit ikki, hvussu álvarsligt hetta her. Eg fekk eina kraftiga stempling, og beint nú er pínan rættiliga ógvuslig. Men vónandi er hetta tó nakað, sum gongur hampuliga skjótt yvir, segði Jónhard eftir dystin.

**-mørk**

### Kári fekk heilaskjálvta

Kári Nielsen mátti longu fyri steðgin fara av vøllinnum sunnudagin. Ein harðligur samanbrestur við Leiv Hanssen gav sandoyinginum hjá HB ein ordans frammaná, og hóast hann royndi at spæla, so var eingin vón um at fullføra dystin. Tað vísti seg, at talan var um heilaskjálvta, og tá vit seinast frættu, var framvegis óvist, hvørt Kári verður tøkur til dystin mikukvøldið, tá HB skal spæla grannuppgerð móti B36.

**-mørk**

Skála-HB 1-1 (1-0):

# HB hevði betur uppiborið

*Skála*

*HB*

**Skála hevði í 70 minuttir hepni við at liggja í verjustøða og dyrgja eftir kontra, men tríggjar minuttir fyri tíð bjargaði Rasmus Nolsøe eitt væl uppiborið stig til gestirnar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skaðalistin hjá Skála taldi bæði Paula G. Hansen og Alexandur Johansen, tá teir sunnudagin høvdu vitjan av HB. Tí var ikki løgið, at útgangsstøðið hjá heimaliðnum var nakað væl varligari, enn vit so ofta hava sæð tað áður.

Við einum tætt fólkaðum miðvølli varð roynt at tippa uppspælið hjá HB, fyri síðani at skapa nakað við kontra-bóltum, og tað var eisini um reppið, at hetta gav øll trý stigini.

Fyrstu løtuna trýsti HB annars ófført ímóti vindinum, meðan Skála hevði ilt við at fóta sær, men brádliga stóð kortini 1-0 á talvuni. HB hevði annars júst havt eina sera vandamikla roynd, tá Vlada Filipovic fantombjargaði roynd frá Róki av Fløtum Jespersen, men so gekk skjótt hinvegin.

Bólturin varð sendur fram í høgru, har Jónhard Frederiksberg smoygdi sær avstað, tá Ramsus Nolsøe fullkomuliga seldi seg í roynd at tackla. Jónhard gjørdi skjótt av og sendi ein neyvan bólt innfyri, og har kom Teitur R. Joensen við fullari ferð og stútaði sítt fyrsta Formula-mál í kassan.

Og so betraðust fortreytirnar hjá Skála fyri kontrabólti enn meira. Teir løgdu seg sera djúpt á vøllinum, og góvu HB mest sum allan vøllin at spæla á, og fyri tað nógva eydnaðist eisini at halda gestunum frá opnum møguleikum. Og enntá var Skála nær við at økja, tá Jónhard varð tacklaður í skotløtuni.



*Fyri tað nógva trýstu Mortan úr Hørg og HB niðaneftir, meðan Bogi Gregersen og Skála lúrdu eftir kontra-møguleikanum*

*Mynd: Álvur*

### Rasmus bjargingarmaður

Seinna hálvleik fekk HB vindin undan, og tendensurin, sum hevði verið, gjørdist nú bara enn sjónligari. Í longum løtum var Skála als ikki í nær námind málinum hjá HB, men tað tóktist tó skula verða ein av teimum døgunum, tá einki vildi bera til hjá havnarliðnum. Og ikki minst mundu teir iðra seg um, at Páll M. Joensen fekk eitt mál kolldømt við einum sera ivasamamum off-side dómi.

At Skála misti Jónhard Frederiksberg, tóktist gera størri mun, enn at HB misti Kára Nielsen, tí eftir hetta var spælstøðin í kontraskipanini hjá Skála púrasta burtur, og so hvørt sum minuttirnir gingu, gjørdist trýstið á Skála bara størri og størri. Framvegis uttan teir heilt opnu møguleikarnar, men ein rúgva av deyðbóltum og trongdum støðum í brotsteiginum myndaðu seinastu trý korterini.

Og bara tríggjar minuttir nar áðrenn vanliga tíðin var farin, brast fyri nev hjá HB. Skála hevði júst mist Levi Hanssen, tá hesin heldur óneyðugt bjargaði sær næsta gula kortið í dystinum. Intensa trýstið gav eina røð av hornaspørkum, og við eitt av hesum stóð Rasmus púra óvardur við handara stólpa og við einum róligum fluktara sendi hann bóltin í meskarnar.

### Høvdu tørv á øllum

Málið var ikki meira, enn HB hevði uppiborið, men tað skerst ikki burtur, at vónbrotið hjá Skála var stórt, nú sigurin glapp teimum av hondum.

Somikið størri var frøin hjá HB, tá útjavningin kom til høldar, men tað skerst tó ikki burtur, at tað fyri báðar partar ráddi um at fáa øll trý stigini, um haldast skuldi fast í fremru liðunum. Tann parturin av ætlanini miseydnaðist, men mikukvøldið hevur HB so enn ein møguleika at gera ein vørr í so máta. Hetta tá teir fara í holt við fyrstu av trimum grannauppgerðum móti B36.

Skála skal ikki ígongd aftur, fyrr enn teir um eina viku fara á vitjan á Eiði.

## Hatta áttu vit til góðar

Malskjúttin hjá HB, Rasmus Nolsøe, var ikki í iva um, at HB átti stigið á Skála so ruddiliga uppiborð.

– Tað haldi eg, at vit høvdu. Ikki minst, tá tú hugsar um, at vit áttu eini 80% av spælinum gjøgnum dystin. Men soleiðis er fótbóltur jú eisini.

Tit trýstu hart og leingi fyri málinum. Var trúgvin upp tað ikki við at ganga undan, tá málið loksins kom?

– Nei, tað haldi eg ikki. Eg haldi, at vit sýna ein sera góðan hugburð í dag, har vit alla somlu tíðina arbeiða knallhart fyri at koma aftur í dystin, og tí er tað kanska eyka gleðiligt, at tað gevur úrslit.

– Men tá tað er sagt, so er tað eitt sindur keðiligt, at vit ikki fáa trý stig burtur úr dystinum. Vit hava sjey stig fyri fimm dystir, og tað er altso ikki heilt so gott, sum vit høvdu ætlað. Spælið hevur tó verið á eini heilt góðari leið, og tað er sjálvandi at fegnast um, men skulu vit longur fram á stigatalvuna, so má úrtøkan eisini betrast, staðfesti Rasmus.

**-mørk**




*Rasmus Nolsøe*

## Fyrsta málið

Tað var ikki frítt, at liðfelagarnir høvdu hug at arga, tá dysturin var av sunnudagin. »Nú er at tosa við pressuna« og »Soleiðis er at vera stjørna, Teitur« ljóðaðu onkrar av viðmerkingunum, tá vit eftir dystin hittu málskjúttan hjá Skála á orði.

Teitur R. Joensen hevur ongantíð áður skotið mál á besta mansliðnum hjá Skála, men tað sást tó ikki aftur, tá hann tók ein harðan túr á 50 metrar, áðrenn hann stútaði neyva innleggið frá Jónhardi Frederiksberg í kassan.

– Eg valdi bara at taka túrin. Eg sá jú, at Jónhard var um at gerast púrasta leysur í síðuni. Vanliga eri eg ikki tann, sum søki nógv inn í feltið, men tað valdi eg so at gera hesaferð, og tað kann eg bara fegnast um, helt Teitur um málið.

Hann staðfesti annars, at málið eisini gav Skála góðan møguleika at leggja spælið júst soleiðis, sum teir høvdu ætlað.

– Vit vildu sleppa at liggja djúpt á vøllinum, fyri síðani at kontra, og tað eydnaðist væl fyri tað nógva. Hinvegin, so fái eg illa sagt, at útjavnandi málið var óuppiborð. Tá hevði HB trýst nógv og leingi, og tí var úrslitið kanska í lagi, segði bæði fegni og erni málskjúttin.

**-mørk**



*Teitur R. Joensen*